Ummæli av konsert í Fuglafjarða kirkju 6. august

# Innlit – ein sjálvsama vælsungin kórkonsert

*"Og nú tykist aftur at verða komið til endurnýggjandi vegamót í føroyskum kórsangi. Tað er lítla føroyska kamarkórið í Keypmannahavn "Mpiri", sum hevur tikið nýggja stigið." Soleiðis tekur Ólavur Hátún til í konsertskránni.*

*Leif Hansen*

"Innlit" eitur kórverkætlanin, sum Mpiri fyri tíð síðani setti í verk. Tankin var at fáa útlendskar tónasmiðir at seta tónleik til føroyskar yrkingar. Tó at føroyskir tónasmiðir lutfallsliga hava skrivað nógvan kórtónleik, so kann verða torført hjá einum kóri sum Mpiri, at seta eina konsertskrá saman, sum skal innihalda tónleik, tey ikki áður hava sungið. Íblásturin til verkætlanina tykjast Mpiri-fólkini at hava funnið í arbeiðinum hjá danska tónaskaldinum Vagn Holmboe, sum í seksti- og sjeytiárunum skrivaði hópin av tónleiki til føroyskar yrkingar. Ásannandi tað ovurhonds stóru ávirkan tónleikurin hjá Holmboe fekk fyri føroyskan kórsang og ikki minst føroyskar tónasmiðir, er verkætlanin hjá Mpiri sera áhugaverd.
Hvørt tónleikurin hjá Holmboe er at fata sum føroyskur tónleikur ella ikki, kann sjálvandi kjakast um. Sjálvur segði Holmboe, at hann sá tónleikin sum verðandi føroyskur, tí hann hevði funnið sær íblástur úr gomlum føroyskum kvæða- og kirkjusangi. Ein sangari úr Mpiri lat í útvarpssamrøðu ongan iva verða um, at hann sá hetta tónleikaliga íkast sum nýggjan *føroyskan* kórtónleik.

**Konsertin**
Eingin ivi skal verða um, at konsertin í Fuglafjarða kirkju 6. august, var ein óvanliga væl sungin konsert. Kórið tykist at verða í toppformi og tó at tónleikurin til tíðir var sera torførur at syngja, so komu tey sannførandi á mál hvørja ferð. Kórið hevur øll árini havt skiftandi manning, men fleiri hava verið við nærum alla tíðina. Bara hendingaferð í ofta kringlutu ljóðmyndini, vóru onkrar av røddunum í so lágar, men heildarmyndin var ein sera vakur og reinur klangur. Frálíki akkustikkurin til júst kórsang í kirkjuni í Fuglafirði gjørdi eisini sítt til, at ljóðmyndin stóð so klár.
Blandaða uppstillingin í hálvsirkul var skilagóð og serliga gott var, at báðir 1. sopranunum stóðu fremst báðumeðin. Hetta gav ein vakran og sera homogenan klang.
Kórleiðarin Erik Jakobsson sum seinastu tvey árini hevur verið kórleiðari tóktist at hava gott tak á tónleikinum og sangarnum. Direktiónsteknist er hann ikki eins tikin úr leikum sum fyrrvernadi leiðarin Gorm Larsen, men endiliga úrslitið kann eg valla annað enn gleðast um.
Burtursæð frá góða gamla *Sig mær, hví er foldin føgur* hjá Sunleifi Rasmussen og Karsten Hoydal, og *Náttarfriður* hjá Paula í Sandagerði og Goethe var allur tónleikurin nýggjur. Hetta er í sær sjálvum einastandandi og áhugavert at verða vitni til.

**Tónleikurin**
Var tónleikurin væl framborin av Mpiri, so er tað kanska nakað misjavnt, hvat dygd viðvíkur í sjálvum tónleikinum. Svenski tónasmiðurin Britta Byström hevði sett tónleik til yrkingina "Nátt í býnum" hjá Katrin Reinert. Hesin tónleikurin var sera torførur at framføra og mær tókti at tónleikurin mest av øllum ljóðaði sum rútmuvenjingar hjá konservatoriunæmingum heldur enn at verða veruligur tónleikur, sum á onkran hátt skuldi setast í samband við eina yrking. Løgið skal tað verða um júst

hetta verk nakrantíð verður á konsertskrá aftur.
Hinvegin var størri tónleikur at hoyra í báðum verkunum hjá danska tónasmiðinum Peter Bruun. Bruun hevði sett tónleik til yrkingar hjá Oddfríði Marna Rasmussen. Annar av satsunum *Glitrandi rípan* kann væl gerast ein sannur fongur hjá kórum kring landið.
Íslendski Hugi Guðmundsson átti uttan iva vakrasta tónleikin á konsertini. Tónleikin hevur hann skrivað til yrkingina hjá Tóroddi Poulsen *Tá myrkrið køvir.* Íblástur frá Eric Whitacre og øðrum tónleiki skrivaður eftir aldarskifti var týðuligur. Tó at tónleikurin væntaði orginalitet, so er hann í einum føroyskum samanhangi nýggjur, og verður heilt víst aftur at hoyra í Føroyum. Enski Gavin Bryars er ikki heilt ókendur í Føroyum og hevur fyrr skrivað tónleik til føroyskar tekstir. Tónleikurin hjá Bryars tykir mær stundum at verða keðiligan og soleiðis eisini á konsertini hjá Mpiri.
Danin Svend Hvidtfelt Nielsen átti tveir satsir til tekstir hjá Carl Jóhan Jensen. Tónleikaliga handverkið tókti mær at verða framúr gott og tónleikurin hekk eisini sera væl saman. Kenslan var, at Hvidtfeld átti tann besta tónleikin á konsertini.

**At enda**
Teir 65 áhoyrarnir fingu eina tónleikaliga uppliving í Fuglafjarða kirkju hendan august-dag samstundis sum klaksvíkingar gjørdu klárt til Summarfestival. Um hetta seinna ávirkaði talið av konsertgestum er ilt at meta um, men spell var, at ikki fleiri komu. Vit, sum vóru í kirkjuni fingu í øllum førum innlit í nýggjan kórsang og framførslu á sera høgum støði.
Tónleikurin fyriliggur nú í nótabók og innspældur á fløgu. Tankin um, at hendan verkætlanin skuldi geva føroyskum kórlívið íblástur er áhugaverdur og einans tíðin fer at vísa hvat kemur burturúr. Hiðani skal í øllum førum ljóða ein tøkk fyri eina sjálvsama vælsungna konsert!